# Heimavøllurin verður avgerandi

**HONDBÓLTUR** Neistin loysti torføru uppgávuna til fulnar og fekk bæði stigini við sær til hús úr Vági. Neistin skal spæla fýra av seinastu fimm landskappingardystunum í høllini á Hálsi, og tað kann vera ein fyrimunur, nú seinasta royndin skal gerast at røkka finaluplássi

Uni Holm Johannesen

Tað var síðsta útkall hjá Neistanum. Taptu neistakvinnurnar hevði verið lítið sannlíkt, at tær høvdu havt virknan leiklut í finalustríðnum. Tað, sum var síðsta útkall, er nú ein stórur fyrimunur. Neistin er tvey stig aftan fyri ovastu liðini, men bæði Tjaldur og Stjørnan skulu á vitjan í høllini á Hálsi næsta mánaðin. Neistin hevur bara ein útidyst eftir á skránni. Tað er móti botnproppinum StÍF – og grannauppgerðin móti Kyndil, har Neistin skal spæla sum útilið.

Sjey mál skilti liðini, tá Neistin vann á VB, sum undan dystinum ikki hevði tapt í síðstu fimm landskappingardystunum.



*Neistin skal spæla fýra av seinastu fimm dystunum á heimavølli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tætt í oddinum

Neistin er tvey stig aftan fyri Stjørnuna, og tvey stig aftan fyri Tjaldur. Neistin er undir trýsti, tí liðið hevur tapt tvær ferðir fyri bæði Stjørnuni og Tjaldri, men bara vunnið eina ferð á hvørjum teirra.

Hóast Neistin skal spæla móti oddaliðunum eina ferð aftrat, styrkir tað ikki um støðuna, kann tað serliga fáa stóran týdning, at dystirnir eru á heimavølli.

## Torførur dystur

VB er komið upp í ferð, og vágskvinnur hava skavað eina rúgvu av stigum saman seinastu vikurnar. 9 stig av 10 møguligum vóru ræðandi hagtøl, áðrenn Neistin fór til Vágs. Tað løgdu neistakvinnur lítið í. Høvuðsstaðarfelagið vann 33-26.

Tað verða dystirnir móti Tjaldri og Stjørnuni, sum vera avgerandi fyri, hvørji lið skulu spæla finalurnar um føroyameistaraheitið. VB og Kyndil hava prógvað, at tey kunnu arga ovastu liðini. Neistin stóð royndina móti vágskvinnum hesaferð. Kyndil fer helst at gera alt fyri, at grannarnir ikki sleppa í finalurnar.

Tað hjálpir lítið at hugsa, hvat kann fara at henda. Um eina viku hava vit kanska øðrvísi støðu. Tá vitjar VB hjá Stjørnuni í Klaksvík, Neistin fær vitjan av VÍF, og Tjaldur spælir á heimavølli móti StÍF.

*uni@sosialurin.fo*

# Eitt fet nærri finaluplássi

**HONDBÓLTUR** Tað var í seinna hálvleiki, at Tjaldur setti ferðina upp. Fyrstu løtuna eftir steðgin buldraðu gestirnir avstað, og síðan var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða

Uni Holm Johannesen

Nú skal røkka ella støkka. Tað eru fimm dystir eftir at spæla í hondbóltskappingini hjá kvinnum. Tá verður endaliga staðfest, hvøji lið skulu spæla finalurnar um FM-heitið. Hóast stigini eru eins nógv verd sum altíð, gerast dystirnir nú av álvara alsamt meira spennandi.



*Nú styttist til tað verður staðfest, hvørji lið skulu spæla finalurnar um FM-heitið. Tjaldur er væl fyri eftir sigurin í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tjaldur tók eitt fet nærri finaluplássi í gjár. Kvinnurnar úr Runavík vunnu sannførandi í høllini á Hálsi, har ungu kyndlakvinnurnar royndu at togast við steypavinnararnar. Kyndil hevur prógvað í hesum kappingarárinum, at liðið kann arga betru liðini viðhvørt. Eftir steðgin var ruddiliga staðfest, at Kyndil fór ikki í tann leiklutin hesaferð.

## Byrjaðu illa

Støðan hjá Tjaldri er greið. Tað ræður um at vinna dystirnar móti niðaru liðunum, og í øllum førum fáa eitt stig í dystunum móti Neistanum og Stjørnuni. Steypavinnararnir loystu fyrsta knútin í gjár.

Tað var annars lítið sannførandi fyri hvíldina. Kyndil, sum bara hevur æruna eftir at spæla fyri í hesum kappingarárinum, stóð einki aftan fyri Tjaldur. Eitt mál skilti liðini í hálvleikinum. Tá sá eisini gott út hjá Kyndil, sum fekk fyrsta mál eftir steðgin. Men so rapaði alt. Tjaldur fór upp í ferð, heimaliðið hugdi mest sum bara at, og gestirnir fingu sjey mál upp í slag, uttan at Kyndil svaraði aftur. Tá var støðan 19-12, og spurningin var bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Tjaldur vann við níggju málum, 30-21.

Adina Petra og Simona Petersen vóru aftur herovastar hesaferð. Tær stóðu fyri meira enn helminginum av málunum hjá gestunum.

*uni@sosialurin.fo*

## Kyndil – Tjaldur

21-30 (11-12)

Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 5-4**
**20 min.: 10-8**
**40 min.: 12-19**
**50 min.: 17-26**

**Kyndil:** Heidi Maria Akselsen 7, Anja Heinadóttir 4, Rannvá Carlsen 3, Ásleyg Súnadóttir 2, Turið Arge, Guðrið Eystberg 1, Súsanna Peteren 1.
**Tjaldur:** Adina Petrea 11, Simona Petersen 8, Benadikta Johannesen 3, Annika Thomsen 2, Jóhanna í Króki 2, Kirstin Gaardbo 1, Barbara Nygaard 1, Jakoba Sevdal 1, Beinta Joensen.
Útvísingar: Kyndil 4, Tjaldur 3.

## VB – Neistin

26-33 (12-16)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 3-6**
**20 min.: 6-12**
**40 min.: 14-22**
**50 min.: 19-29**

**VB:** Gurið Mortensen 5, Rannvá Johannessen 5, Justina Balzarviciute 4, Bára K. Mortensen 4, Gintare Lydekaite 4, Svava Vestergaard 2, Laila Jespersen 1, Andrea Nielsen 1.
**Neistin:** Barbara Brauer 9, Nicoletta R. Hansen 8, Unnur Danielsen 4, Rakul Magnussen 3, Lovisa Andreasen 3, Bára Hansen 2, Jacklin Durhuus 2, Jenny Kragesteen 1, Birita Wardum 1.

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 19 | 543 | 447 | 96 | 30 |
| 2 | Stjørnan | 18 | 514 | 421 | 93 | 30 |
| 3 | Neistin | 19 | 525 | 442 | 83 | 28 |
| 4 | VB | 19 | 481 | 474 | 7 | 20 |
| 5 | Kyndil | 19 | 438 | 464 | -26 | 14 |
| 6 | VÍF | 18 | 406 | 497 | -91 | 7 |
| 7 | StÍF | 18 | 351 | 513 | -162 | 1 |

# 28 dagar síðan seinast

**HONDBÓLTUR** Kappingarskipanin hjá Hondbóltssambandinum hevur ikki staðið royndina. Kyndil hevði vitjan av Tjaldri í gjár. Tað var fyrsti landskappingardysturin hjá besta kvinnuliðnum hjá felagnum í 28 dagar

Uni Holm Johannesen

Tað skal ikki koma fyri, at tað eru samfullir 28 dagar, ella fýra vikur, millum tveir landskappingardystir í bestu hondbóltskappingini. Tað er lítið stimbrandi at venja, uttan at spæla dystir, men seinastu fýra vikurnar hevur besta kvinnuliðið hjá Kyndli bara vant, hóast tað nærkast endanum av kappingarárinum, Kyndil hevði vitjan av VÍF tann 5. februar í ár. Liðið slapp aftur at spæla dyst í gjár, tann 6. mars.

Vikuna eftir, at Kyndil og VÍF spældu í høllini á Hálsi, vóru steypafinalurnar á skránni. Vikuna eftir hevði Kyndil frívikuskifti, og síðsta vikuskiftið vóru eingir dystir á skránni.

Slíkt má ikki koma fyri. Tað er óseriøst.

*uni@sosialurin.fo*